

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 07 - 2012

# Steðga allari framleiðsluni á norskum øki

Arbeiðsgevararnir í norsku oljuvinnuni seta nú hart ímóti hørðum í arbeiðsósemjuni á landgrunninum. Á midnátt mánakvøldið verður verkbann, og øll olju- og gassframleiðsla steðgar samstundis. -Vit hava einki annað amboð fyri at fáa enda á verkfallinum. Tí varskógva vit verkbann í einari roynd at fáa eina samráðingarloysn, sigur kunningarleiðarin hjá Oljeindustriens landsforening, Eli Ane Nedreskår, við NTB. Verkbannið ber í sær, at øll olju- og gassframleiðsla steðgar, og at tann fíggjarligi missurin verður nógv størri. Men sambært felagnum er eingin onnur loysn. Tað er nú 12 dagar, síðani verkfallið byrjaði, og sambært kunningarstjóranum hevur verkfallið kostað oljudeløgunum umleið 2,3 milliardir krónur higartil. -Støðan er fastlæst, har arbeiðstakararnir krevja pensjónsviðurskiftini inn í lønarsáttmálan, og hesum hava vit ikki heimild til at eftirlíka. Vit vilja heldur hava teir at umhugsa okkara tilboð, sum gevur meiri enn fimm prosent í lønarhækking, og hendir tað ikki, vilja vit hava myndugleikarnar at leggja uppí við teimum amboðum, sum teir hava, sigur Eli Ane Nedreskår við NTB. Hetta merkir í roynd og veru, at arbeiðsgevararnir royna at tvinga starvsfólkini aftur til samráðingarborðið, samstundis sum teir biðja myndugleikarnar leggja uppí, um hitt miseydnast, skrivar norska tíðindastovan.